**Títt Rúm 10 ár**

Fyrst vil eg takka tykkum fyri at tit hava boðið mær her í dag, til 10 ára hátíðarhaldið fyri Títt Rúm.

Títt Rúm – Eitt tilboð til avvarðandi hjá persónum, sum eru bundin av rúsdrekka ella rúsevnum.

Vit vita, at tey sum eru avvarðandi hjá fólki, sum eru bundin av rúsdrekka og rúsevnum, kenna seg ofta einsamøll.

Støðan tey eru í, er ofta duld, tí hon er tengd at eini sera stórari skammarkenslu.

Eg haldi, at nýggja heiti hjá tykkum "Títt Rúm", er eitt sera gott og sigandi heiti í mun til virksemið hjá tykkum.

Tað er júst tað tit eru:

- eitt "rúm", har avvarðandi ikki nýtast at vera einsamøll
- eitt "rúm", har tøgnin verður brotin

At hjálpa teimum, sum vaksa upp við rúsbundnum foreldrum, við at geva teimum eitt "rúm" til at viðgera teirra kenslur og upplivingar. Tað kann verða við til at fyribyrgja, at hesi venda sær til rúsin, tá ið lívið gerst trupult.

Og harvið er møguligt at fyribyrgja, at so mong endurtaka mynstrið hjá foreldrunum.

**Øll kenna vit onkran**

Øll kenna vit onkran og vita um vinfólk, kenningar, ja ella vit sjálvi, ið hava havt foreldur, ella annað foreldrið hevur verið rúsbundið.

Tað geri eg eisini – Eg kann hyggja eftir mínum egna barndómi og míni ungdómstíð. Satt at siga, so hugsaði eg ikki so nógv um tað tá – men akkurát hesir tankar hava ofta vitja aftur – hví varð ikki tosað um hetta? Hvat bleiv gjørt? Eg veit ikki um nakað bleiv gjørt?

Minnist sjálv í heimbygdini, hvussu, lat okkum kalla hana Sára, - Hvussu sjálvbjargin Sára var – hvussu væl hon dugdi alt, hvussu væl hon kláraði seg – allastaðni – helt eg. Eg sá ikki annað – tá. Eg visti væl, at pápi hennara drakk nógv. Eg minnist eisini at hann plagdi at vera ein av teimum monnunum, ið stóðu í lokalu kioskini og drukku øl, tá eg sum barn fór oman at keypa mær bomm. Minnist eisini, at Sára ikki tímdi at koma við, tá eg skuldi í kioskina.

Og akkurát tað, at sleppa sær undan støðum, har man varð mintur á bundinskapin, ella at onnur skuldu síggja til bundinskapin, dugi eg at síggja nógv týðiligari í dag. Vit fóru sum børn ikki heim til Sáru at spæla og tað vóru ikki foreldrini hjá Sáru, ið vóru við til kappingar og annað frítíðarítriv.

Eg kann bara ímynda mær, hvussu strævið hetta hevur verið hjá Sáru. Eg kann eisini fegnast um, at tað hevur gingist henni væl – hóast tey kor hon fekk sum barn og ta umsorgan hon helst -hevur mangla –. Eg hugsi, at eitt myrkt skýggj má hava hingið yvir henni øll barna og ungdómsárini og

helst eisini ein stóran part av vaksnamannalívinum. Kenslan av ikki at vera góð nokk. Ongantíð góð nokk í nøkrum sum helst. Og hon má hava kent seg einsamalla.

Eg varnaðist ikki hetta sum barn.

Ekkaleys spældu vit okkum gjøgnum barndómin og inn í tannárini, tí vit sóu tað ikki beinleiðis. Tað var dult. Men tað var har.

Fleiri onnur eru í somu støðu sum Sára. Hetta fór fram í míni heimbygd, einari púra vanligari bygd í Føroyum, og henda forteljingin er hvørki sjáldsom ella einstøk. Í veruleikanum kundi hon gott verið verri. Vit hoyrdu t.d. ongantíð nakað um harðskap.

Søgan er hvørki tíðarbundin ella staðbundin. Hetta kom fyri fyrr og tað kemur fyri í dag, og tað fer eisini at vera í framtíðini.

**Tørvur er framhaldandi á tilboðnum frá Títt Rúm**

Tá ið Blái Krossur tók stig til átakið "Øll hava rætt til góð barnaár" í 2012, byrjaði átakið sum ein verkætlan. Átakið er vaksið nógv hesi góðu 10 árini, og er nú vorðið eitt skipað tilboð.

Í dag er tilboðið til børn, ung og vaksin í aldursbólkinum 0 – 35 ár, sum eru avvarðandi hjá foreldrum, ið eru bundin av rúsdrekka ella rúsevnum. Og eg veit, at tit eisini leggja stóran dent á, at hava vælskikkað starvsfólk, sum veita einstaklingum og bólkum ráðgeving.

Fólk, sum ikki hava havt bundinskap tætt inn at lívinum, skilja ikki altíð støðuna hjá einum avvarðandi, og kunnu tí hava trupult við at seta seg inn í støðuna, og at veita rætta stuðulin og hjálpina. Ikki tí at viljin ikki er til staðar, men tey hava ikki royndirnar ella rætta serkunnleikan, sum tørvur er á.

Tey sum vanliga eru netverkið hjá eini familju, tað vil siga, familja, vinir, grannar og onnur, eru eisini ofta óvitandi um, at ein ella fleiri í einum húski eru rakt av bundinskapi av rúsdrekka ella rúsevnum.

Har koma vit aftur inn á skommina, sum familjan, sum er rakt av bundinskapi livur við. Og at hesar familjur í flestu førum dylja, hvat fer fram heima við hús. Tey avvarðandi sita tískil ofta einsamøll. Tey hava ongan, sum tey kunnu venda sær til, uttan at avdúka støðuna, sum familjan er í.

Tað er ikki altíð neyðugt, at avvarðandi fáa hjálp og stuðul frá fólki við viðkomandi royndum og serkunnleika, tað kann eisini verða nokk, ella í øllum førum ein stór hjálp, at venda sær til sítt netverk. Men tað eru ikki øll, sum kunnu venda sær til eitt netverk.

Tí er tað so umráðandi, at eitt tilboð er til tey avvarðandi. Eitt tilboð har tey kunnu venda sær til at fáa hjálp og stuðul, tá gerandisdagurin gerst trupul. Eitt rúm, har onnur avvarðandi eisini eru, og har møguleiki er at fáa hjálp frá fakfólki.

Títt Rúm har avvarðandi – børn, ung og vaksin - møta øðrum við líknandi avbjóðingum.

Vit vilja øll hava eina kenslu av at hoyra til felagsskapir. At vera ein partur av onkrum. Títt Rúm er rúmið hjá teimum avvarðandi, har útgangsstøði verður tikið í støðuni og tørvinum hjá tí einstaka.

Tað er einki at ivast í, at tørvur hevur verið, og er framvegis fyri hesum tilboðnum.

**Heildarætlanin fyri at fyribyrgja og tálma rúsevnisnýtslu í Føroyum 2022-2028**

Sagt verður, at fyri hvønn rúsbundnan, eru í minsta lagi eini fýra fimm onnur, sum líða undir bundinskapinum, ið setur síni fingramerki á alla samveru og samskifti teirra millum, og broytir tey.

Familjan er grundarlagið undir einum samfelag. Tí er tað eisini umráðandi, at vit taka hond um familjuna, og serliga um familjur sum stríðast.

Við at seta inn so tíðliga sum gjørligt, er eisini møguligt at bróta mynstrið – har ættarlið eftir ættarlið kunnu hava nærum somu trupulleikar – eisini nevnt ættarliðsavbjóðingar. Millum annað hetta kom fram í viðgerðini, tá “Heildarætlanini um at fyribyrgja og tálma rúsevnisnýtslu í Føroyum 2022-2028” varð skrivað.

Nú eg nevni “Heildarætlanina”, vil eg eisini nýta høvi, at takka tykkum, fyri tykkara luttøku í sambandi við arbeiðið at orðað heildarætlanina.

Talan var um eitt stórt og umfatandi arbeiði, sum var gjørt. Tykkara luttøka í arbeiðinum, var til stóra hjálp hjá arbeiðsbólkinum. Bæði við luttøku á hoyringsfundum og tilfari, sum arbeiðsbólkurin fekk frá tykkum til heildarætlanina.

**Rættstundis hjálp og samstarv**

Tað eru nógv børn og ung, sum liva í heimum við foreldrum, ið eru bundin av rúsdrekka ella rúsevnum.

Vit hava ikki føroysk tøl fyri hesum - sjálvandi kundi tað verið áhugavert – men eg loyvi mær at siga, at tað eru alt ov mong.

Kanningar vísa, at avvarðandi hjá persónum, sum eru bundin av rúsdrekka, eru í nógv størri vanda fyri at líða av ringari heilsu. Tað er tað áhaldandi sálarliga trýstið og strongdin, sum ávirkar heilsuna hjá teimum avvarðandi.

Vit vita frá granskingini, at ung, ið koma úr hesum familjum, eru í størri vanda fyri at fáa tunglyndi, angist, hava lægri sjálvvirði og ganga oftari við tankum, um ikki at orka lívið.

Sálarligu avbjóðingarnar vísa seg ofta ikki fyrr enn seinni í lívinum, sum álvarsligar seinfylgir. Tey hava truplari við at klára vanliga gerandisdagin, útbúgving, arbeiði, ilt við at fáa parlagið at rigga. Í síðsta enda kanska truplari við sjálvi at vera foreldur.

Tann góða søgan er tó, at granskingin vísir eisini, at tað hjálpir at fáa hjálp. At lata upp og tosa um avbjóðandi støðuna. Tess fyrr, tess betur.

Tað hjálpir at tosa við onnur um tínar tankar og alt tað, tú bert ótta fyri. Tá kennir tú teg minni einsamalla/einsamallan. Og saman við øðrum eru vit sterkari.

Sára, sum eg tosaði um í áðni, og systkin hennara, høvdu tørv á hjálp. Tess fyrr, tess betur.

Ungdómurin er eitt lyklatíðarskeið í eini lívsævi. Tað er tá, at vit í nógvar mátar verða tilevnað sum menniskju. Hendingar, sum vit eru fyri, og tað, sum vit velja á ungdómsárum, kunnu hava avgerandi týdning fyri restina av lívinum.

Eg fegnist um, at Títt Rúm framhaldandi arbeiðir við at menna samstarvið við avvarðandi partar, sum á ymiskan hátt hava við tey, ið koma í Títt Rúm, at gera.

Í hesum høpi er sera umráðandi við samstarvi. Samstarv kann vera avgerandi fyri, at tey, sum hava tørv á tí, fáa røttu hjálpina.

Í "Heildarætlanini" verður nevnt, at hóast føroyska samfelagið er lítið, hava vit nógvar myndugleikar, hjálparfelagsskapir og skipanir, sum arbeiða við hesum økinum.

Hetta er ikki bara ein styrki.–Ein av niðurstøðunum í heildarætlanini er, at tað kann vera ein vansi, um ymiskir partar ikki samstarva væl.

Nakrir av hoyringspørtunum gjørdu vart við, at hetta kann gera tað trupult at halda skil á og finna røttu skipanina. Ja, at fáa røttu hjálpina.

Eg eri eisini fegin um, at samgongan hevur sett bundinskap av rúsdrekka og rúsevnum á dagsskránna. Ætlanin hjá samgonguni er, at fólk sum eru rúsbundin, skulu hava viðkomandi tvørfakliga viðgerð og hjálp sum skjótast. Arbeiðast skal við at menna eitt meira fjøltáttað tilboð við ambulantari viðgerð. Hetta kemur eisini at gagna familjunum hjá teimum, sum eru rúsbundin.

**Varðveita NGO-mentanina**

Sambært ársfrágreiðingini fyri Títt Rúm, er umleið helmingurin av útreiðslunum hjá Títt Rúm, fíggjaður av privatum stuðlum, landsinnsavnan, fyritøkum, grunnum og endurnýtslubúðunum.

Títt Rúm er ein partur av Bláa Krossi, sum er ein hjálparfelagsskapur – ein sokallaður NGO, ein almannagagnligur felagsskapur óheftur av politiskum myndugleikum.

Blái Krossur hevur trý hjartamál.

- At hjálpa teimum, sum eru rúsbundin.
- At hjálpa familjunum hjá teimum, sum eru rúsbundin.
- Og at arbeiða fyribyrgjandi, soleiðis at menniskju ikki verða rúsbundin.

Tað sum serliga eyðkennir hjálparfelagsskapir eru:

- at endamálið er, at fremja vælgerð uttan at fáa nakað aftur fyri
- at hjálparfelagsskapurin miðar ikki eftir vinningi – allar inntøkur fara óskerdar til endamáli hjá felagsskapinum
- at hjálparfelagsskapur hevur ikki eigarar ella partaeigarar, sum skulu hava úrtøku frá virkseminum

Mær dámar væl hesa NGO-mentanina.

Hjálp verður veitt teimum sum hava tørv á tí, uttan at tað kostar fyri tey, sum móttaka tænastuna.

Øll, sum hava tørv á tænastuni hjá Títt Rúm, hava sama møguleika og somu atgongd til tænastuna.

Føroya Løgting hevur í nógv ár játtað pengar til viðgerð av bæði vaksnum og ungum, sum eru rúsbundin.

Tað er at fegnast um, at pengar, seinnu árini, eisini eru játtaðir til at veita hjálp til familjurnar hjá teimum, sum eru rúsbundin.

Ein familja er ein familja. Hon er kjarnueindin í samfelagnum, og hon er tað týdningarmesta hjá teimum, sum eru í henni.

Vit eiga at stuðla øllum familjum.

Við hesum orðum, fari eg at ynskja tykkum hjartaliga tillukku við 10'ára hátíðarhaldinum.

Takk fyri!